


# LEIÐARI TIL SØLU- OG MARKNAÐARDEPILIN Á FT SAMSKIFTI

## Ert tú leiðari við áhuga og royndum innan sølu- og marknaðarføring? So bíðar eitt avbjóðandi og spennandi starv eftir tær!

FT Samskifti skal seta nýggjan leiðara á Sølu- og marknaðardeplinum. FT Samskifti mennir, marknaðarførir og selur tænasturnar, sum Føroya Tele veitir fyritøkum og einstaklingum.

Sølu og marknaðardepilin hevur ábyrgd av sølu og marknaðarføring av øllum teimum loysnum, sum FT Samskifti bjóðar kundum sínum. Depilin er samansettur av marknaðardeild, vinnudeild og seks telebúðum úti um landið. Tilsamans starvast gott 70 starvsfólk í deplinum.

Leiðarin skal í høvuðsheitum tryggja eina miðvísa framgongd í sølu og úrtøku hjá FT-samskifti.

Leiðarin er partur av leiðslutoyminum á FT Samskifti.

**Umsøkjarin**
Tú hevur viðkomandi hægri útbúgving og hevur hollar royndir innan leiðslu av starvsfólki við atliti til sølu og marknaðarføring. Tú hevur kundan í fokus, sært møguleikar heldur enn forðingar og trívist við avbjóðingum. Tú dugir at skipa sølu og marknaðararbeiði og hevur góð evni at samstarva og samskifta. Tú dugir væl við fólki og at fáa tey at gera sítt besta. Og so hevur tú sans fyri góðum keypmansskapi.

**Arbeiðsinnihald**
- Menna marknaðarføring og sølu, bæði mótvegis vinnuni og privatu kundunum
- Alla tíðina at laga útboð av vørum og tænastunum til, so tær samsvara við kundatørv og samstundis geva felagnum nøktandi inntøkur.
- Yvirskipað leiðsla, ráðlegging og fíggjarstýring.
- At vegleiða og eggja leiðarum og starvsfólki.

**Umsókn og starvsviðurskifti**
Starvið skal setast skjótast gjørligt.

Lønin verður eftir avtalu.

Tú fært meira at vita um starvið frá Jan Mortensen, stjóra á FT Samskifti, á tlf. 243301 ella teldupost jmo@ft.fo. Eisini ber til at venda sær til starvsfólkadeildina.

Umsóknir við CV og prógvum skulu vera starvsfólkadeildini í hendi í seinasta lagi 23. apríl 2008. Viðmerk á brævbjálvan "Depilsleiðari til Sølu- og marknaðardepilin".

**Føroya Tele**
Starvsfólkadeildin
Postsrúm 27
110 Tórshavn
ella starvsfolkadeildin@ft.fo

Føroya Tele er ein fyritøka í stórum vøkstri, sum eftir fáum árum hevur ment seg til eina effektiva og nútímans fyritøku, ið er kappingarfør á øllum økjum. Vit hava sett okkum fyri at menna nýggjar tænastur og bjóða føroyska marknaðinum bestu tænastuna og nýggjastu tøknina. FT Samskifti er dótturfelag í samtakinum Føroya Tele. Í FT Samskifti starvast 100 fólk, og fyritøkan tekur sær av marknaðarføring, sølu, tænastu, kundarøkt og samskifti við privat- og vinnukundar hjá Føroya Tele.

FØROYATELE




# TVEY MARKNAÐARFÓLK TIL FT SAMSKIFTI

## Fremsta KST-fyritøka í Føroyum, Føroya Tele, er í stórari menning. Bæði í Føroyum og altjóða. Marknaðardeildin er ein av miðdeplunum í hesi menning, og nógvar spennandi uppgávur bíða eftir røttu starvsfólkunum.

Marknaðardeildin er partur av Sølu- og Marknaðardeplinum, har tilsamans 70 fólk starvast. 6 fólk eru tilknýtt Marknaðardeildini. Deildin hevur m.a. ábyrgd av marknaðarføring og innrætting í handlunum hjá Føroya Tele, marknaðarføringini hjá Vinnudeildini og flestu portalum og heimasíðum hjá Føroya Tele.

Vit sóknast eftir tveimum nýskapandi og kveikjandi fólkum.

Felags fyri størvini er, at nýggju starvsfólkini:
- Hugsa í "skeivum" vinklum
- Eru sosial og dáma at hava samband við nógv ymisk fólk
- Megna at hava nógvar bóltar í luftini í senn
- Eru nærløgd og samstarvsfús
- Eru von við samskipan og projektleiðslu
- Hava hugburðin, at ongin uppgáva er ov lítil, og ongin er ov stór
- Duga sera væl at málbera seg skrivliga á føroyskum og enskum

Nøkur dømi um arbeiðsuppgávur:
- Ábyrgd av marknaðarátøkum
- Nýtt innrættingarkonsept til handlarnar
- Endurnýggjan av øllum kundatilfari
- Endurnýggjan av sponsor- og stuðulspolitikki
- Ábyrgd av útgávu av Tráðinum (Blað hjá Føroya Tele)
- Projektleiðslu av útgávu av Telefonbókini

Vit vænta, at umsøkjarar hava viðkomandi útbúgving og hava stóran áhuga fyri marknaðarføring.

Umsøkjarar við royndum innan samskipan og projektleiðslu hava fyrimun.

Vit bjóða eitt starv við avbjóðingum og møguleikum fyri víðarimenning í einum framtakshugaðum umhvørvi.

Neyvari upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til Annleyg Lamhauge, tel. 303315. Størvini verða lønt sambært avvarandi sáttmála. Umsóknir, CV og avrit av prógvum skulu verða Føroya Tele í hendi í seinasta lagi 21. apríl 2008 og skulu sendast til:

Føroya Tele
Starvsfólkadeildin
Postrúm 27
FO-110 Tórshavn

FT Samskifti er dótturfelag í Føroya Tele. Í felagnum er øll kundarøkt, øll søla og alt samskifti við privat- og vinnukundar, alt GSM-samskifti og øll staðarútgerð fyri fastnettelefoni og breiðbandi. Í felagnum starvast 115 fólk. Tænastur frá FT Samskifti verða marknaðarførdar undir navninum Føroya Tele.

FØROYATELE